**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og øðrum fiskasløgum á Landgrunninum. Túrur nr. 1642**
**Tíðarskeið 12 - 19/10 - 2016**

---

**Fólk frá HAV:** Karina P. Debes, Poul Vestergaard, Guðrún Bech, Regin Kristiansen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og øðrum fiski á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:** Sum vanligt hevur verið í fleiri ár, vórðu umleið 28 toskar í støddini 45-55 cm á Mýlingsgrunninum latnir Umhvørvisstovuni til kanningar.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 100 mm meskum í brókaposanum. Vágslemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, klokka, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini mikudagin 12/10 kl. 15. Vit byrjaðu at merkja vestan fyri Skúvoy, tí streymurin var harðnandi. Síðan fluttu vit nakrar toskar til økið vestan fyri Suðuroy. Vit høvdu síðan nøkur fá hál vestan fyri Suðuroy, men har var lítið at fáa, so vit fóru á Bøin (vestur úr Mykinesi) at royna í staðin. Eftir tað fóru vit á Mýlingsgrunnin og eystur um Fugloy/Nólsoy. Til seinast merktu vit nakrar toskar á Norðhavinum. Vit vóru á Havnini týsdagin umleið kl. 10.30. Veðrið var gott allan túrin og tí bar til at merkja fisk á nógvum støðum. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri, merktir vórðu tilsamans 2211 fiskar.

**Fyribilsúrslit:** Sum heild var lítið at fáa av toski, tó at meira var at fáa enn í fjør. Vit merktu eisini onnur fiskasløg, m.a. hýsu og reyðsprøku. Vit fingu 50 merktar toskar aftur; av teimum høvdu 39 verið í sjónum í eitt ár ella longri. Vøksturin var 6 cm um árið. Toskurin var væl fyri, konditiónsfaktorurin (K) var ofta yvir 1,1.

| Øki | Reyðsprøka | Sandsprøka | Tunga | Makrelur | Hýsa | Toskur | Miðallongd | Miðal K |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 0 | 0 | 0 | 1 | 10 | 429 | 61.5 | 1.16 |
| Bøurin | 0 | 1 | 0 | 0 | 17 | 266 | 63.4 | 1.14 |
| Eystanfyri | 0 | 0 | 0 | 1 | 7 | 308 | 64.4 | 1.12 |
| Norðhavið | 13 | 1 | 7 | 0 | 16 | 354 | 60.1 | 1.17 |
| Vestan fyri Skúvoy | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 604 | 64.0 | 1.07 |
| Vestan fyri Suðuroy | 0 | 0 | 0 | 0 | 36 | 22 | 63.3 | 1.13 |
| Skúvoy til Suðuroy | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 118 | 63.4 | 1.09 |
| Íalt | 13 | 2 | 7 | 2 | 86 | 2101 | 63.5 | 1.15 |

Tilsamans 2211 fiskar

Eisini kann nevnast, at í fyrsta hálinum (vestan fyri Skúvoy) fingu vit ein hemara, sum var 212 cm langur. Í maganum vóru fiskarestir, millum annað 3 toskanytrur frá tveimum ella trimum toskum. Út frá longdini á nytrunum bar til at meta, at toskarnir vóru millum 58 og 64 cm langir, við øðrum orðum rættiliga stórur toskur (smáfiskur). Hendan støddin lá nær við miðalstøddina av merktum toski vestan fyri Skúvoy (64 cm).

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur 18. oktober.

Á Havstovuni 20. oktober 2016
Petur Steingrund – kanningarleiðari.